# Veðrið



**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:** Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og vestri og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið leygardagin:** Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og sólglottar, men eisini mjørki í støðum. Hitin millum 13 og 16 stig, men har mjørki er, um 12 stig.




**Veðrið sunnudagin:** Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og útnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 10 og 13 stig, um náttina niður í 7 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:** Gul til stívt andøvsgul av vestri og útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar mánadagin, men týsdagin møguliga regn. Hitin millum 10 og 14 stig, um náttina niður í 9 stig.



# Ragnar í Vík klintrar upp eftir

JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD

Føroyski countrysangarin Ragnar í Vík er nú komin á TOP 20 á counytónleik hitlistanum, sum spældur verður á evrupeiskum útvarpsstøðum.

Aktuella lagið er „You broke your own heart" á Tutl-fløguni „The silence of a falling star", har Ragnar syngur sangir hjá Hank Williams.

Ragnar fegnast um heiðurin og hevur góðar vónir um framtíðina.

– At eg nú eri staddur á 17 plássi á hesum lista merkir ikki, at eg longu eri farin at selja fløgur kring Europa. Men vónirnar eru bjartar. Mín fløga verður nú løgd fram í største plátuhandlinum í Århus og vit arbeiða við at sleppa at spæla í Danmarks Radio og í TV 2, sigur Ragnar í Vík.

–- Eg arbeiði við at gera eina nýggja fløgu við songum eftir Hank Williams. Eg havi longu fingið fýra ókendar, men ógvuliga vakrar sangir, frá familjuni hjá Hank. Eitt er vist, hendan fløgan skal upptakast í Nashwille. Tað er eins og nakað serligt við tí, tá countrytónleikur verður upptikin í Nashwille, sigur Ragnar í Vík.

# Tango avloysir Norrønu

JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD

NORRÖNA verður á skipasmiðju frá 9. september til 7. oktober 2000. Hesa tíðina siglir TANGO einsamallur. Tango tekur ikki ferðafólk

Tango fer hvørja viku av Havnini hóskvøld, leggur at í Hanstholm leygardag og haðani siglt verður aftur seinnapart sama dag til Føroya, hagar komið verður mánamorgun.

Av tí at TANGO tekur so nógvan farm, hevur tað víst seg ikki at vera tørvur á mánadags fráferðunum. Tí verða mánadagstúrarnir ikki sigldir, so leingi TANGO er í sigling.

Men tá Norröna aftaná umvælingina í heyst aftur kemur í sigling, verðuraftur siglt tveir túrar aðruhvørja viku (líkatals vikur). T.v.s., at mánadagstúrarnir verða uppafturtiknir við fráferð av Havnini mánakvøldið 16. oktober.

Um tað tó vísir seg, at tørvur verður á mánadagstúrinum áðrenn ta tíð, verður hesin eisini sigldur, boðar Smyril Line frá.







Lágtrýstið vestanfyri Ísland fer eystureftir og hitabrúgvin haðani er yvir Føroyum í dag.




Lágtrýstið í landnyrðing úr Íslandi fer í landnyrðing, meðan lágtrýstið vestanfyri Ísland fer eystureftir.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 11 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 11 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 14 |
| Aberdeen | 17 |
| London | 22 |
| Tromsø | 12 |
| Bergen | 16 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 15 |
| Keypmannahavn | 19 |
| Helsinki | 19 |
| Moskva | 22 |
| Berlin | 23 |
| Warzawa | 25 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 27 |
| Paris | 21 |
| Madrid | 27 |
| Róm | 27 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 30 |
| Malta | 28 |
| Tunis | 33 |
| Beijing | 25 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | – |
| New York | 28 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 25 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 28 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 15 |




**Hitalagið mált frá 02./08. kl 06⁰⁰–03./08. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,6°C**
Minsti hiti máldur í august: **0,2°** Mesti hiti máldur í august: **22,0°**




Avfallið: 0,1 mm – **mált frá 02./08. kl 6⁰⁰–03./08. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í august: 0,1 mm

## Vestfalskyrrindi

30. juli: Mánin næstur jørðini
31. juli: Tendring
7. aug.: Fyrra kvarter
11. aug.: Mánin longst frá jørðini

Kelda: Skipalistin 2000

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/ Sundalagnum fp | sp | Vestmanna-sundi fp | sp | Mykines-firði fp | sp | Nólsoyar-firði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/ Svínoyarfirði fp | sp | Hvanna-sundi fp | sp | Fugloyar-firði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. aug. | 10.09 | 22.29 | 09.09 | 21.29 | 09.24 | 21.44 | – | 12.09 | 00.49 | 13.09 | 08.24 | 20.44 | 07.24 | 19.44 | 10.24 | 22.44 | 11.24 | 23.44 | 09.54 | 22.14 | 11.09 | 23.29 |
| 5. aug. | 10.52 | 23.14 | 09.52 | 22.14 | 10.07 | 22.29 | 00.29 | 12.52 | 01.29 | 13.52 | 09.07 | 21.29 | 08.07 | 20.29 | 11.07 | 23.29 | – | 12.07 | 10.37 | 22.59 | 11.52 | – |
| 6. aug. | 11.38 | – | 10.38 | 23.03 | 10.53 | 23.18 | 01.14 | 13.38 | 02.14 | 14.38 | 09.53 | 22.18 | 08.53 | 21.18 | 11.53 | – | 00.29 | 12.53 | 11.23 | 23.48 | 00.14 | 12.38 |
| 7. aug. | 00.03 | 12.31 | 11.31 | – | 11.46 | – | 02.03 | 14.31 | 03.03 | 15.31 | 10.46 | 23.17 | 09.46 | 22.17 | 00.18 | 12.46 | 01.18 | 13.46 | – | 12.16 | 01.03 | 13.31 |





**Skerimaskinur**
*verða nýttar til:*
• asfalt og betong
• umvæling av vegum
• skering í asfalt til útgrevstur

Leverandørurin til entreprenørar í 28 ár. Tosið við okkum!
Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

Grannskoðan • Ráðgeving
Bókhald • Skattamál
- og annað



RASMUSSEN & WEIHE
STATSAUTORISERAD GRANNSKODARAFELAG P/F
An associated firm of PricewaterhouseCoopers
Á GLADSHEYGGI - BOX 30
FO-110 TÓRSHAVN - P/F NR. 267
TEL. (+298) 311017 - FAX (+298 311018)
e-mail: rasmussen@rasmussen.fo
Heimasíða: www.rasmussen.fo

Sosialurin - 311820

Sig tað uttan rokning




pétur & pétur • 320870

Føroya Tele kann nú bjóða tær eina heilt nýggja tænastu til tína GSM fartelefon, ið kallast Føroya Teletíð.

*Kom inn í eina av Telebúðunum og hoyr meira um, hvussu tú sleppur undan telefonrokningunum...*

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • www.tele.fo

Sp/f V.V.S. Hornið
Lágpríshandil

Alt innan hitaverk & sanitet so sum:

**Stoypijarnsketil • Sanitet**
**Kranar • Baðirúmsmøblar**

Støkk inn á gólvið ella ring:
**Landavegur 2, Tórshavn**
**Tlf. 318023/Fax 310963**

**Runavík tlf. 447773**
Opið er í Runavík
mikudag kl. 13-17.30
og leygardag kl. 10-14.